

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 11 - 2012

# Lógvatak fyri vindinum

Alt gekk væl, tá SEV gjáramorgunin tók í brúk fimm nýggjar týskar vindmyllur. Eftir væl vald orð frá løgmanni, SEV stýrisformanni og fólkunum, sum hava staðið fyri hesi slóðbrótandi verkætlanini, varð farið út í Neshaga at skoða verkið, sum eisini er meira enn bara ein vindmylnulund  tað er eisini ein náttúrulund og ein frøði fyri likam og sál Nýasfalteraði vegurin heilt á Eystnes hevur bráddliga skapt ein fyri føroyingar og fyri fremmanda fólk nýggjan útferðarmøguleika. Benkur eru settir upp og ein túrur gjøgnum vindmylnulundina er ein sermerkt og góð uppliving, har tú sær oyggjarnar frá einum øðrvísi sjónarhorni og har tú fær eina jaliga kenslu av, hvussu náttúran og náttúrukreftirnar kunnu fjálga um bæði so og so. Geniala vindskýlið - minnisvarðin yvir gamla vindmyllu - hjá arkitektinum Eyðun Eliassen ger upplivingina tað størri. Neshagi er einki minni enn ein perla, sum uttan iva fer at draga mong til sin. Her fær tú kensluna av, at tað ber til at faa vindmyllur og nattúru at sampakka. Væl gingið SEV og toftafólk. Mynd -  Dagurin í gjár mundi kennast stórur serliga fyri stjóran og verkætlanarleiðaran hjá SEV, sum tóku lógvatak saman. Vakra og serstaka vindskýlið hjá Eyðun Eliassen, arkitekti.